| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 28. januar 2016 |
| Býráðsfundur nr. | 01/2016 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2016 tann 28. januar kl. 17.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 21. januar 2016 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Asbjørn Berthelsen
Birgir Petersen

Asbjørn Berthelsen møtti á fundinum sum varalimur á lista D fyri Árant Berjastein, sum hevði boðað frá forfalli.

Sínun Jákup Eliassen møtti sum varalimur á lista B fyri Sigurð S. Simonsen til viðgerð og avgerð av máil nr. 12/2016, sí viðmerkingar undir hesum máli.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 01/2016.**

**Tilmæli um Arbeiðssetning og bygginevnd til nýggjan barnaskúla í Fuglafirði.**

Mentamálanevndin hevur frá ársbyrjan, arbeitt við at skipa eina tilgongd, til bygging av barnaskúla í Fuglafirði.

Mentamálanevndin valdi á fundi 7. januar 2016, at heita á Rúna Abrahamsen frá Map arkitektum, saman við Mentamálanevndini at fyrireika og tilrættisleggja eina tilgongd til bygging av skúla.

Fyri at tryggja eina skilvísa tilgongd, hevur Menntamálanevndin saman við Rúna Abrahamsen, orða ein Arbeiðssetning fyri skúlabyggingina, til býráðið at taka støðu til.
Arbeiðssetningurin er við til at málrætta verkætlanina og skal lýsa tørvin hjá Fuglafjarðar skúla. Hartil er arbeiðssetningurin við til at leiðbeina bygginevndina í at orða eina byggiskrá, ið verður løgd fyri býráðið til politiska støðutakan.

Bygginevndin, ið verður sett av Fuglafjarðar býráð, skal koma við tilmæli um hvussu Fuglafjarðar skúli skal útbyggjast.
Í fyrstu atløgu er talan um barnaskúla, hølir til tónleik, herundir musikskúla, heimkunnleika umframt felagsøkir.
Í aðru atløgu er talan um møguliga útbygging av framhaldsdeild.
Tilmælið er samstundis ein byggiskrá, sum lýsir øll viðkomandi viðurskiftir til politiska støðutakan.

Byggiskráin skal verða liðug innan 1. juni 2016

Við byggiskránni sum grundarlag, verður **heildarætlan** fyri framtíðar skúlan gjørd, sum bygginevndin góðkennir. Við støði í heildarætlanini verður **skitsuuppskot** (dispositiónsuppskot) til nýggjan barnaskúla gjørt. Uppskotið, sum er grundarlagið fyri framhaldandi projektering, skal góðkennast av býráðnum. Projekteringin er liður í tilgongdini at fáa til vega sáttmála við byggifyritøkur at standa fyri bygginini. Býráðið góðkennir byggisáttmálar.

Bygginevndin hevur fulla ábyrgd av verkætlanini. Leikluturin hjá bygginevndini broytist so hvørt sum verkætlanin búnast. Í fyrstuni hevur bygginevndin stóran leiklut og beinleiðis ávirkan, meðan seinni í verkætlanini er leikluturin eftirlit og góðkenning. Tá byggisáttmálar eru undirskrivaðir, skal bygginevndini møguliga mannast av nýggjum ella leikluturin endurskoðast.

**Arbeiðssetningur**

Bygginevndin skal lýsa tørvin hjá Fuglafjarðar skúla. Við støði í tørvslýsingini, skal bygginevndin

koma við tilmæli um heildarætlan, bygging og innrætting av skúlanum. Umframt nýggjan barnaskúla, sum er grunddeild og miðdeild, skulu atlit takast til framtíðar dagføring av framhaldsdeild og møguligar aðrar útbyggingar. Byggiskráin skal eisini umfata umstøður til tónleik, hornorkestrið, savningarstað (aula/kantina) og hølir til heimkunnleika.

Bygginevndin skal samskifta við allar viðkomandi partar og soleiðis tryggja, at allir viðkomandi upplýsingar verða tiknir við í tilmælinum.

Tilmælið fevnir um byggiskrá, sum yvirskipað lýsir tíðarætlan, kostnaðarkarm, námsfrøðilig og teknisk atlit.

Bygginevndin situr fram til avhendan av byggingini, og hevur ábyrgd av, at verkætlanin verður framd í samsvar við byggiskrá og býráðssamtyktir.

**Bygginevnd**

*Uppskot til bygginevnd:*

Eyðun á Lakjuni formaður í mentamálanevndini, (formaður)
Ólavur Thomsen, skúlastjóri
Pætur Joensen býarverkfrøðingur
Rønn Eliassen, mentamálaleiðari
Fía Jacobsen, lærari
Gudny Vang, skúlastýrisformaður

*Ráðgevi:*

Rúni Abrahamsen arkitektur

Á fundi 21. januar 2016, viðtók ein samd Mentamálanevnd Arbeiðssetning og uppskot til Bygginevnd. Mentamálanevndin mælir tískil til at býráðið somuleiðis tekur undir við báðum uppskotum.

**Avgerð:**
Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá mentamálanevndini um arbeiðsetningin og ráðgeva hjá bygginevndini. Tilmælið varð samtykt. (9-0)
Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá mentamálanevndini um val av bygginevnd, og varð tilmæli samtykt. 8 atkv. fyri og 1 atkvøða blonk. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Magnus S. Midjord, Sigga Óladóttir Joensen, Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni,Dánjal Vang, Birgir Petersen og Petur Abrahamsen. Blankt atkvøddi Asbjørn Berthelsen.

**<u>Mál nr. 02/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi leingjan av konsulentavtalu við SP/F Mortan í Hamrabyrgi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá Mortani í Hamrabyrgi, tannlækna, dagfest 08. desember 2015 saman við ískoyti til konsulentavtalu millum kommununa og SP/F Mortan í Hamrabyrgi fyri barna- og ungdómstannrøkt.

Talan er um avtalu yvir 3 ár frá frá 01. juli 2016 at rokna fram til 30. juni 2019.

Fíggjarnevndin hevur móttikið tilmæli frá sosialu nevndini frá 14. januar 2016, har nevndin mælir einmælt býráðnum/fíggjarnevndini til at leingja konsulentavtaluna við SP/F Mortan í Harrabyrgi í 3 ár frá 01. juli 2016 til 30. juni 2019.

Nevndin varð á fundinum samd um, at tað er bæði betur og rættari fyri tannlækna, tannrøktara og viðskiftafólk at avtalan verður longd til eina 3 ára avtalu enn eina 1 ára avtalu, sum hevur verið galdandi, síðan høvuðssáttmálin varð gjørdur tann 10. desember 2013.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 20. januar 2016, og tekur nevndin fult undir við tilmælinum frá sosialu nevndini og heitir tessvegna á býráðið um at góðkenna, at ein 3 ára konsulentavtala verður gjørd við SP/F Mortan í Hamrabyrgi galdandi frá 01. juli 2016 at rokna.

Nevndin hevur staðfest, at fyrisitingarliga kann ein leingjan av konsulentavtaluni bert verða gjørd fyri eitt ár í senn, og tí verður neyðugt at leggja málið fyri býráðið til endaliga góðkenning, tá ið farið verður út um hesa tíðarfreist.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá sosialu nevndini og fíggjarnevndini og góðkenna at leingja konsulentavtaluna við SP/F Mortan í Hamrabyrgi í 3 ár frá 01. juli 2016 at rokna. (9-0).

**<u>Mál nr. 03/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar Havn.**

Í samband við íløgur í Fuglafjarðar havn hevur teknisk deild gjørt kostnaðarmeting fyri arbeiði, ið ætlanin eru at fremja í 2016, og sum ikki eru tikin við í góðkendu fíggjaræltanini fyri 2016. Partar av hesum varð fígging til í 2015, men vórðu íløgurnar ikki eru yvirførdar við neyðugari fígging frá 2015, tá ið figgjarætlanin fyri ár 2016 var gjørd og endaliga samtykt.

*Kostnaðarmeting frá teknisku deild til írestandi fígging 2016 verður lýst niðanfyri:*

| | |
|---|---|
| **Øki til Vónina á Enni:** | |
| Dekkgrót | kr. 1.100.000,- |
| Planering, kloakkir vatnleiðing | kr. 400.000,- |
| <u>Spreingiarbeiði: umleið 6 – 7 m niðan</u> | <u>kr. 1.100.000,-</u> |
| **Samanlagt til øki á Enni** | **kr. 2.600.000,-** |
| | |
| **Øki til silobararí hjá Havsbrún:** | |
| Dekkgrót | kr. 150.000,- |
| | |
| **Frystikaj III**: | |
| Fellur til gjaldingar í 2016 sam. | |
| Sáttmála við J & k Petersen | kr. 4.500.000,- |
| <u>Endaveggur heimeftir írestandi fígging</u> | <u>kr. 3.000.000,-</u> |
| **Samanlagt** | **kr. 7.500.000,-** |

Samanlagt **kr. 10.250.000,-**

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. januar 2016, og mælir nevndin fíggjarnevndini/býráðnum til, at íløgurnar verða fíggjaðar við eini eykaajáttan fyri ár 2016.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 20. januar 2016, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 4,5 mió. til írestandi sáttmálaarbeiði hjá P/F J & K Petersen, hetta sambært undirskrivaða sáttmálan partanna millum, dagfestur 21. september 2015.

Talan verður sostatt um eina eykajáttan til rakstrarstað 751 Íløgur í Fuglafjarðar havn konto 3141-00, sum hækkað verður við nevndu kr. 4,5 mió upp á kr. 15.140.000,00. Avsettar eru kr. 10.640.000,00 á fíggjarætlanini fyri 2016, har kr. 7,1 mió skulu verða nýttar til keyp av gróti frá Havsbrún sambært skrivligari avtalu, kr. 2,0 mió til bátahylin, kr. 1,0 mió til frystibryggjuna og kr. 640.000,00 til aðara íløgur eitt nú stuðlamúr við Vónina. Staðfest er sosattt, at eingin framflyting er gjørd av ónýttum játtanum fyri 2015 til 2016.

Staðfest er, at kommunan hevur goldið felagnum kr. 2.056.000,00 fyri arbeiðið, ið gjørt er í 2015, so sambært fyriliggjan resta sostatt kr. 4,5 mió í til gjald til felagið fyri 2016.

Fyribils tøl fyri 2015 vísa, at nýttar eru kr. 16.674.468,01 móti eini játtaðari avseting upp á kr. 21.100.000,00 í fíggjarætlanini. Sosatt er minninýtslan kr. 4.425.631,59.

Fíggingin av eykajáttanini verður fingin til vega frá § 25 Gjaldføri (innistandandi peninbgi), sum flutt verður frá 2015 til 2016.

Ein eykajáttan sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkkan á roknskap kommununar fyri 2016.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verðá víst á, hvussu hon skal verða fíggjað.

Í hesum máli, eins og í øðrum verður víst til § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við broytingum um nevndarformenn, at hesir ansa eftir, at ballar inntøkur og útreiðslur hava neyðuga játtan.

Nevndin viðgjørdi eisini málini um eykajáttanina til øki til Vónina upp á kr. 2,6 mió. og frystibryggjuna upp á kr. 3,0 mió. ella tilsamans kr. 5.6. Nevndin tók ikki støðu til hesar eykajáttanir á fundinium, við tað at nevndin vildi hava eina nærri útgreining av:

A. Økinum hjá Vónini, har avsettar og nýttar eru kr. 3,0 mió í 2015, sum er tann játtan, sum samtykt varð í fíggjarætlan kommununar til hetta endamál sambært meting, og hví henda upphædd nú er hækkað við kr. 2,6 mió upp í kr. 5,6 mió.

B. Eina nærri útgreining av endavegginum heimeftir, har írestandi fígging er kr. 3,0 mió. Spurningurin er, um hetta er samsvarandi tí tilmæli, sum vinnunevndin lat fíggjarnevndini í sambandi við fíggjarætlanarynski fyri 2016.

Somuleiðis ynskti nevndin at fáa eina frágreiðing um, hvørjar upphæddir fyri keyp av gróti skulu verða sendar frá havnini til aðrar íløgur í onnur rakstrarøki/rakstrarstøð. Talan er um eitt nú grót til gongugøtuna Kambsdalur/Fuglafjørður, útstykkingar vm.

Um so verður, at allar eykajáttanirnar verða samtyktar av býráðnum, so verður talan um eina samlaða íløgujáttan til Fuglafjarðar havn upp á kr. 10,640 mió + kr. 10,25 mió. ella tilsamans kr. 20,89 mió. ella útvið sama játtan, sum samtyktar vórðu til íløgur í havnina í 2015.

Nevndin varð samd um, at fáa neyðugar upplýsningar til vega beinanvegin, og at málið verður viðgjørt á fyrst komandi nevndarfundi.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 25. februar 2016. 8 atkvøður fyri og 1 atkvøða ímóti. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Magnus S. Midjord, , Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Birgir Petersen, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Asbjørn Berthelsen. Ímóti atkvøddi Sigga Óladóttir Joensen.

**<u>Mál nr. 04/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi eykajáttan til Fuglafjarðar sløkkilið - Brandstøðina.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið áheitan frá Johann Clementsen, brunaleiðara saman við tilboði frá KJ Hydraulik, dagfest 31. desember 2015 upp á kavaplógv/saltspreiðara til Brandstøðina upp á kr. 107.520,00 + okkara part av meirvirðisgjaldinum kr, 6.720,00 ella tilsamans kr. 114.240,00.

Sum støðan er í 2015, so er eingin peningur avsettur til íløgur í brunaverkið, so neyðugt er við eini eykajáttan til keypið í 2016, um íløgan skal verða framd í nevnda ári.

Tó hevur býráðið møguleika fyri at gera eina tekniska umflyting á øki 7 "Brunaverkið" frá rakstri til íløgur upp á nevndu kr. 114.240,00, sum skal hava eina viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 28. januar 2016.

Staðfest er, at samlaðu rakstrarjáttanirnar neyvan verða uppbrúktar í 2015. Nýtslan pr. ultimo deember 2015 er kr. 1.065.348,00 móti eini hättan upp á kr. 1.310.000,00, so eftir at nýta eru kr. 244.651,86. Fyrivarni verður tó tikið fyri, at rokningar møguliga kunnu koma aftrat.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. januar 2016 og mælir einmæld býráðnum til at veita eina eykajáttan til Brunaverkið upp á kr. 114.240,00 við tekniskari umflyting millum rakstararstað 772 konto 1100 (lønir) til rakstrarstað 772 konto 3000 løðuútreiðslur.

Í hesum máli verður víst til § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri um nevndarformann, har hesin ansar eftir, at allar inntøkur og útreiðslur hava neyðuga játtan.

Eisini verður víst til § 41, stk. 2 í omanfyri nevndu lóg, citat: "Kommunustýrið kann tó veita eykajáttan. Eykajáttanin krevur 2 viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon skal verða fíggjað".

Mett verður, um so verður, at eykajáttanin verður samtykt, so verður ikki neyðugt at viðgera málið sum beinleiðis eykajáttan 2 ferðir, við tað at talan er um tekniska umflyting millum rakstrarstøð í øki 7 "Kommunal virki" rakstur til íløgur, sum útgreinað er omanfyri.

Um talan er umflytingar millum 2 ella fleiri økir, so er neyðugt við eykajáttan, so viðgjørd skal verða sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, og sum skal verða viðgjørd 2 ferðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Ein eykajáttan sum henda, har talan møguliga verður um tekniska yvirflyting í saman øki førir ikki eina eyka útreiðslu við sær fyri kommunukassan. Men um ein vanlig eykajáttan við 2 viðgerðum verður gjørd í 2016, so kann henda føra við sær, at hon kemur at hava eina beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2016, um so verður at upphæddin ikki verður fingin til vega við umflytingum millum rakstrarstøð og konti.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna eina tekniska umflyting í øki 7 millum rakstur og íløgur í Brunaverkið. (9-0).

**<u>Mál nr. 05/2016.</u>**

***Mál viðv. roknskapinum hjá Fuglafjarðar bókasavni fyri 2015.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá fyrisitingini, dagfest 20. januar 2016 saman við grannskoðaðum til roknskap fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2015 frá "Januar – løggilt grannskoðaravirki" saman við grannskoðarafrágreiðing fyri bókasavnið.

Roknskapurin vísir, at samlaðu útreiðslurnar hava verið **kr. 731.044,21** móti mettum kr. 831.918,00. Sostatt eru kr. 100.873,79 minni nýttar enn mett. Lønirnar hava verið kr. 25.710,05 lægri enn mett, og er her talan um minni nýtslu av lønum til bókasavnshjálparar. Býráðið setti tann 01. mai 2011 nýggjan bókavørð við útbúgving í starv, og at lønin hjá hesum er væl hægri flokkað enn fyribilsstarv hjá bókavørði uttan útbúgving, og tí varð avsetingin fyri 2011 ov lág. Hetta er nú komið í rættlag fyri bæði 2012, 2013 og 2014 og 2015.

Húsaútreiðslurnar hava verið kr. 22.551,80 lægri enn mett, eitt nú grundað á at ljós og hiti hevur havt eina lægri útreiðslu upp á kr. 8.823,29, meting kr. 90.200,00 brúkt kr. 67.648,20. Útreiðslur til bókakeyp og innbinding hava verið kr. 37.571,92 lægri enn mett, við tað at metingin varð kr. 133.000,00, meðan staðfesta nýtslan hevur verið kr. 95.428,06.

Aðrar útreiðslur hava verið kr. 18.380,16 lægri enn mett. Útreiðslurnar hava generellt verið lægri enn mett, meðan útreiðslurnar frá viðlíkahaldi av EDV hava verið hægri. Avsettar vórðu kr. 112.318,00 í fíggjarætlanini, meðan nýtslan hevur verið kr. 93.937,54.

Inntøkurnar hava verið kr. 136.018,00 í landskassastuðli móti mettum kr. 322.767,20, t.v.s. kr. 216.749,20 lægri enn mett, og hevur kommunan sostatt borðið restina av kostnaðinum – inntøkur upp á kr. 3.771,00 ella 591.255,21.

Bókasavnslógin heimilar upp til 40% í stuðli av eini góðkendari rakstrarætlan. Stuðulin verður inntøkuførdur tað árið, hann er játtaður, eftir rakstrarætlanini fyri árið eftir. T.v.s. at rakstrarstuðulin sum er inntøkuførdur í 2014 er grundaður á rakstrarætlanina fyri 2015. Sambært rakstrarætlanina fyri 2015 varð roknað við einum kostnaði upp á kr. 831.918,00 at reka bókasavnið.

Soleiðis skuldi landskassastuðulin verið kr. 332.767,20 men sambært skrivi frá Føroya Landsbókasavni dagf. 16. juli 2008, verða bert kr. 460.000,00 góðkendar sum útgjaldsgrundarlag, sum hetta skuldi givið kommununi kr. 192.000,00, men eru játtanin eftir hetta lækkað niðan í kr. 136.018 ella við kr. 55.982,00.

Víst verður eisini til skriv frá Søvnum landsins, dagfest 27. mai 2014, at góðkend rakstrarætlan fyri bókasavnið fyri 2014 er kr. 425.056,00, harav ætlað stuðulsveiting er kr. 170.022,00, og at forskotsútgjaldingin er 80% ella kr. 136.018,00. Henda upphædd er júst tann, sum útgoldin er í 2015, men sambært skrivinum resta sostatt kr. 34.004,00 í at fáa játtaðu kr. 170.022,00. Sostatt er góðkenda fíggjarætlanin teirra vegna kr. 425.056,00, so útgoldna stuðulsveitingin í 2014 og 2015 varð bert 136.018,00 svarandi til 18,60%. Sostatt verður kommunan at rinda 81,4% ella kr. 591.255,21.

Sostatt er einki sum helst lutfall millum tey 40%-ini hjá landskassanum og tey 60%-ini hjá kommunukassanum. Við tí støði, sum Søvn landsins hava lagt undir raksturin av bókasavninum, so skal hesin bert verða kr. 425.056,00 ella eina slaka ½ av tí, sum býráðið annars hevur tikið avgerðir um fyri 2014.

Roknskapurin 2015 vísir, at kr.196.769,20 resta í Landskassastuðli, um talan varð um 40%, so er býtið 60>40% er ikki í lagi. Sambært roknskapinum er hetta 82>18%.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 20. januar 2016, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2015 uttan viðmerkingar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2015. (9-0). Heitt verður á fyrisitingina um at gera vart við yvir fyri Søvnum landsins og Mentamálaráðnum, at lutfalsbýtið millum land og kommunu ikki er nøktandi, tá ið kommununar partur av útreiðslunum er vaksin munandi seinastu árini.

**<u>Mál nr. 06/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi rokningum fyri vinnudagin í Mentanarhúsinum.**

Í sambandi við vinnudagin, sum hildin varð í Mentanarhúsinum, so hevur kommunan móttikið niðanfyri standandi rokningar:

| | | |
|---|---|---|
| Kveikir v/Hergeir Eldevig | kr. | 10.000,00 |
| Restaurant Muntra | kr. | 24.750,00 |
| Jógvan Joensen | kr. | 3.000,00 |

**Samantals kr. 37.750,00**

+ okkara part av meirvirðisgjaldinum kr. 2.359,38, svarandi til tilsamans kr. 40.109,38.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini tann 12. januar 2016 og mælir ein meiriluti Magnus Midjord og Sigurð S. Simonsen til vísandi til kommunustýrisskipanina grein 7. 1. petti at heita á fíggjarnevndina/býráðið um at avgreiða hetta mál, soleiðis at rokningar verða goldnar og fíggjaðar av konti 750 Fuglafjarðar havn umboðan.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 20. januar 2016 og varð avgerð tikin um at beina málið til viðgerðar/avgerðar í býráðnum uttan tilmæli, hetta vísandi til § 7. 1. petti í Kommunustýsisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, góðkend03. sptember 2001 við seinni broytingum.

§ 7, 1. petti sigur citat:"Borgarstjótin ansar eftir, at hvør peningaupphædd – tað verið seg inntøka ella útreiðsla við kommunukassan – er bókað í kommunuroknskapinum, og at upphæddin hevur heimild í ársfíggjarætlanini ella eykajáttan. *Er talan um eina peningarupphædd, ið heimild ikki er fyri, leggur hann málið fyri býráðið*".

**Avgerð:**
Samtykt varð at rinda rokningar fyri vinnudagin, hetta vísandi til § 7, 1. petti í Kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu. (9-0).

**Mál nr. 07/2016.**

**Umsókn frá Ingimundi Hansen um byggiloyvi til sethús.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Ingimundi Hansen, dagfest 26 oktober 2015 um byggiloyvi til sethús á matr nr.23b á Ennivegi 113 í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini 16. november 2015 og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvið verður givið soleiðis at

1. Treytirnar í Almennu Byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og Kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
   *Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.*
2. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
3. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
4. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av Teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
5. Har grivið verður móti granna skal arbeiði verð gjørt soleiðis at bakið verður tryggja á nøktandi hátt, og ikki er til ampa fyri grannastykkið og ikki hevur størri hall enn 1:1,25 og skráin er inni á tygara ogn. Gjørt verður vart við at í samband við hetta grevstrar/spreingi- og byggiarbeið kann kommunan ikki ábyrgdast fyri møguligan skaða á annan manns grund ella ogn.
6. Tá grivið verður móti kommunalum vegi skal grevstrararbeiði verða gjørt soleiðis at tað ikki verður grivið undan vegnum.
7. Húsini skulu verða sett av Teknisku deild.
8. Kommunan skylar sær reætt til at leggja neyðugar leiðingar gjøgnum stykkið.

Byggiloyvið er galdandi 2 ár frá ústkrivingardegnum

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 08/2016.**

**Umsókn frá Kato um keyp av lendi frá Fuglafjarðar kommunu.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Kato, v/Kaju Toftegaard, dagfest 06. desember 2015 um at keypa 5,5 m2 av matr nr. 239a, hetta fyri at betra um parkeringsviðuskiftini við Kato.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini 20. januar 2016 og mælir nevndin býráðráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti, soleiðis at hesir 5,5 m2 av matr. nr. 239a verða lagdir saman við matr. nr.317a hjá Fa Kato v Kaju Toftegaard.

Eingin konstruktión omaná lendi skal verða í mark. Kommunan gerð avmerking við hvítari strípu.

**Avgerð:**
Tilmæli frá tekniksu nevndini varð samtykt. 6 atkvøður fyri og 3 atkvøður ímóti. Fyri atkvøddu Magnus S. Midjord, Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Birgir Petersen, Dánjal Vang og Asbjørn Berthelsen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen og Petur Abrahamsen.

**<u>Mál nr. 09/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi leigusáttmála við P/F Petur Larsen.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá P/F Petur Larsen, dagfest 22. desember 2015, hvar greitt verður frá, at í sambandi við broyttan virkisbygnað hevur felagið tørv á einum nýggjum leigusáttmála.

Fyrisitingin hevur gjørt uppskot til møguleikar á økinum, sum sent er m.a. P/F Petur Larsen við telduposti, dagfestum 05. januar 2016 og boðar felagið aftur kommununi frá við telduposti, dagfestum 11. januar 2016 at felagið mælir býráðnum til uppskotið um nýggjan leigusáttmála partanna millum yvir 30 ár frá 2016-2046.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini 19. januar 2016, og mælir nevndin býráðnum til, at nýggjur leigusáttmáli verður gjørdur fyri matr. nr. 239aa sambært fyriliggjandi uppskot frá fyrisitingini.

**Avgerð:**
Tilmæli frá vinnunevndini varð samtykt. (9-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin var Jákup Frants Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 10/2016.</u>**

**Skriv frá Dánjal Vang um nevndarsessin í skúlabygginevndini.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Dánjali Vang, dagfest 18. januar 2016, har hann sigur nevndarsessin frá sær í skúlabygginevndini. Sigurð S. Simonsen fór úr hesum nevndarsessi tann 12. november 2015, so hann kundi koma í henda.

Tí mælir hann til, at Sigurð S. Simonsen verður valdur inn aftur í henda sess.

**Avgerð:**
Eftir áheitan frá Dánjali Vang varð samtykt at taka máli av skránni og útsett til viðgerð á komandi býráðsfundi 25. februar 2016. (9-0).

**<u>Mál nr. 11/2016.</u>**

**Skriv frá Dánjali Vang um formansstarvið í gamla Fk bygninginum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Dánjali Vang, dagfest 18. januar 2016, har hann sigur formansstarvið frá sær í "Gamla FK handlinum", tí uppgávan, sum hann fekk av býráðnum er lokin.

Tekningar eru fingnar til vega, so býráðið má taka støðu til, hvussu víðari skal fara fram.Men ivasamt er, um tekningarnar vísa, um hetta er rætti vegurin at ganga.

Sum støðan er í løtuni hevur býráðið einki álit fingið frá bólkinum til at taka støðu út frá, og tí má metast fyrisitingarliga, at arbeiðið ikki er lokið hjá bólkinum.

**Avgerð:**
Eftir áheitan frá Dánjali Vang varð samtykt at taka máli av skránni og útsett til viðgerð á komandi býráðsfundi 25. februar 2016, tá ið málið um FK bygningin verður lagt fyri býráðið. (9-0).

**<u>Mál nr. 12/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi borðfæi til fyrrverandi borgarstjóra.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá Sigurði S. Simonsen, dagfestur 06. januar 2015 hvar hann metir, at hann eigur at fáa borðfæ kr. 20.000,00 um árið útgoldið við afturvirkandi kraft til 01. januar 2001, tá ið hann tók við starvinum sum borgarstjóri.

Hann visir í skrivinum til viðmerkingarnar í grannskoðarafrágreiðingini fyri roknskaparárið 2013 um borðfæið, um at heimild ikki varð fyri at útgjalda hetta, og varð hetta tikið upp til nýggja viðgerð.

Niðurstøðan var, at Niels W. Poulsen, advokatur og Fróði Sivertsen stats. aut revisorur vórðu samdir um, at heimild varð fyri útgjaldi.

Í hesum sambandi skal verða víst til fundir og teldupostasamskifti við fyrrverandi borgarstjóran, har ein fyrisitingarlig semja varð gjørd við viðkomandi um, at viðkomandi frá og við 2013 skuldi fáa kr. 20.000,00 um árið í 5 ár til og við 2017 tilsamans kr. 100.000,00. Talan varð um rindan av borðfæi afturvirkandi í 5 ár, sum tó skuldi verða goldið framyvir.

Talan er um borðfæ sambært grein 34 í Kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu við gildiskomu sambært kommunulógini frá 01. januar 2001, og sum annars vísir til § 1, stk. 2 í løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn vm til landsstýrismenn við seinni broyting.

Stk. 2 sigur citat: "Løgmaður fær í borðfæi kr. 60.000,00 árliga og landsstýrismenn kr. 20.000,00 árliga. Borðfæið er skattfrítt".

Málið, sum inn varð komið frá fyrrverandi borgarstjóranum, varð síðan sent grannskoðara kommununar til møguligar viðmerkingar við undirliggjandi skjølum, og varð semja um partanna millum at senda málið víðari til sakførara kommununar til løgfrøðisliga meting, áðrenn ein endalig støða varð tikin, um heimildir vórðu fyri at gjalda borðfæ út afturvirkandi fyri 12 ár frá 01. januar 2001 at rokna.

Eftir hetta hevur samskifti verið millum fyrisitingina, grannskoðaran og løgfrøðing kommununar, eins og seinast nevndi eisini hevur fingið neyðugt skjalatilfar frá kommununi.

Niels W. Poulsen, løgfrøðingur hevur við skrivi til P/F Januar, att. Fróða Sivertsen, dagfest 13. november 2015 gjørt eitt løgfrøðisligt upprit um gongdina í málinum, og er komin til ta niðurstøðu, at tá ið málið sambært býráðsskrivaranum er sent frá borgarstjóra til fíggjarnevndina, verður mælt til, at fíggjarnevndin framhaldandi viðgerð málið og tekur endaliga støðu.

Hann metir, at fíggjarnevndin hevur heimild at gera nýggja avtalu við Sigurð S. Simonsen, um hon ynskir tað.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 20. januar 2016, men varð ikki semja í nevndini fyri at avgreiða málið. Meirilutin í nevndini Magnus S. Midjord og Eyðun á Lakjuni tekur undir við at játta borðfæið afturvirkandi til 01. januar 2001, har víst verður millum annað til rættvísisprinsipp.

Ein minniluti Sonni á Horni metir, at kommunan hevur eina avtalu við fyrrverandi borgarstjóran um borðfæið, eins og hann metir, at talan varð um mál, sum er fyrnað.
Komið varð eisini inn á spurningin um skattlig viðurskifti av borðfænum, og hvar stjórin á Taks í miðlunum hevur upplýst, at eingin heimild varð í skattalógini ella aðari lóg varð fyri at rinda borðfæ til borgarstjórar uttan um A-skattaskipanina.

Nevndin mælir til at lata málið til viðgerðar og endaliga støðutakan í býráðnum.

**Avgerð:**
Eyðun á Lakjuni setti borgarstjóranum fyrispurning, vísandi til teldupost, sum hann hevðiu sent honum tann 21. januar 2016 um at flyta málið frá opnum til læstar dyri grundað á, at talan eftir hansara metan er um persónsmál, har víst verður til § 1, 2. petti í fundarskipan býráðsins. Borgarstjórin svaraði, at hann hevði móttikið teldupostin, men helt fast við sína avgerð um, at málið skuldi verða viðgjørt fyri opnum hurðum. Hann vísti til frágreiðing og grundgevingar hjá løgfrøðingi um lýsing av málinum, og og grundgevingar hansara fyri niðurstøðu, um hví málið eigur at koma fyri á opnum býráðsfundi.

Uppskot frá Sonna á Horni um at halda fast um avtaluna við Sigurð S. Simonsen um kr. 100.000,00 í borðfæi yvir 5 ár frá 2013 at rokna sum fyrisitingin hevur gjørt við viðkomandi.

Uppskot frá Birgiri Petersen um at ógilda avtaluna, sum fyrisitingarliga er gjørd er við Sigurð S. Simonsen, og ístaðin rinda fyrrverandi borgarstjóranum borðfæ afturvirkandi til 01. januar 2001, t.v.s. í 12 ár.

Atkvøtt fyri um uppskotið hjá Sonna á Horni. Uppskotið fall. 4 atkvøður fyri og 5 atkvøður ímóti. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Petur Abrahamsen og Asbjørn Berthelsen. Ímóti atkvøddu Magnus S. Midjord, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang, Birgir Petersen og Símun Jákup Eliasen.

Síðan varð atkvøtt um uppskotið hjá Birgiri Petersen, sum varð samtykt við 5 atkvøðum fyri, 1 atkvøðu ímóti og 3 blonkum. Fyri atkvøddu Eyðun á Lakjuni, Magnus S. Midjord, Dánjal Vang, Birgir Petersen og Símun Jákup Eliassen. Ímóti atkvøddi Sonni á Horni. Blankt atkvøddu Sigga Óladóttir Joensen, Petur Abrahamsen og Asbjørn Berthelsen.

Henda samtykt førir sosattt við sær, at fyrrverandi borgarstjórin skal hava eitt samlað borðfæ upp á kr. 240.000,00 – ta upphædd, sum útgoldin er higartil upp á kr. 60.000,00 ella kr. 180.000,00.

Sigurð S. Simonsen luttók ikki á fundinum, meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin, grundað á ógjegni. Símun Jákup Eliassen møtti til viðgerð og avgerð av málinum, sum 2 varalimur á lista B fyri Sigurð S. Simonsen, sí § 10, stk. 3 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Asbjørn Berthelsen

Birgir Petersen

Símun Jákup Eliassen
(sum luttók, meðan mál nr. 12/2016 varð viðgjørt og avgerð tikin).

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen